anhang, har tað ikki gevur meining at tulka somu royndir inn í orðið. Vit kunnu - og skulu - granska í Føroyum, men soleiðis sum orðið verður brúkt í altjóða høpi ber ikki til at brúka setningin "at vit skulu satsa uppá gransking". Setningurin er meiningsleysur, soleiðis sum hesin setningur verður brúktur aðrastaðni, tí vit hava einki "granskingarumhvørvi" á einum einstøkum fakøki, sum ger, at hesi fólk kunnu gerast ein miðdepil fyri hetta granskingarøkið. Tá ið eitt gandaorð verður brúkt til at byggja eina loysn á, fáa vit ta fiksu loysnina. Tí noyðast vit í tí einstaka førinum at umseta tær royndir, sum onnur gera, til okkara umhvørvi. Hetta er sjáldan nøkur einføld umseting.

### Eitt kjak uttan gandaorð

Í tíðarinnar strategisku analysu er tað vanligt at remsa hóttanir og møguleikar, styrkir og veikleikar. Í mongum viðgerðum fáa vit at vita, at í tí altjóðagjørda vitanarsamfelagnum eru heilt aðrir og betri møguleikar enn teir, sum vóru í ídnaðarsamfelagnum. Tað, sum vit sjáldan hoyra er, at hesir møguleikar eru truplir at taka við hjá tí lítla, ríka, útibyrgda samfelagnum í Atlantshavi. Eitt meira realistiskt boð uppá hesa gongd er, at tað áliggur okkum í Føroyum at skapa og byggja upp nakrar møguleikar á nýggja altjóða leikvøllinum. Tá ið vit hoyra roynd fólk í vinnuni tosa um teirra gerandisdag, hóma vit hendan veruleikan.

Gandaorðini í løtuni eru slík sum gransking, privatisering, fremmandur kapitalur, innlendis kapping, liberalisering o.o. Vit hoyra nógv kjak, men lítið hevur verið at hoyrt ella sæð til hesi hugtøk í eini samanhangandi meting havandi í huga føroysk viðurskifti anno 2005 - sum í praksis merkir, at vit skulu meta hesi viðurskifti havandi í huga 50.000 borgarar úti í Atlantshavi í einum altjóðagjørdum heimi. Vit hoyra fólk leggja øðrum teirra motiv til last eins og nógv halda okkum í Føroyum verða ov konservativ. Men eg skilji ikki støðuna so eintýðugt. Eg skilji fullvæl, at vanligi borgarin er varin. Harvið er politikarin eisini varin.

Nógv av tí naiva práti um at opna seg mótvegis umheiminum er veruleikafjart. Sjálvandi skalt tú sum boksari sláa viðhvørt, men meginparturin av tíðini í ringinum fer til at verja seg. Sama er galdandi í einhvørjum fótbóltsdysti eins og í hvørjum kríggi. Verjan er fortreytin fyri sigrinum. At leggja seg skerflatan fyri mótstøðuni er snøgt sagt tápuligt, og vit fáa løn sum fortjent, tá ið vit gera tað. Veruleikin har úti á altjóða marknaðinum er beinhørð kapping til strikuna - og tað er ein kapping um hvørt einstakt arbeiðspláss. Stjórar á stórum fyritøkum, politikarar í høgum sessum og kongalig verða send til arbeiðis í førum, sum vit mangan halda vera "smáttaríir" í teirra hugaheimi.

### Til ber

Hvat sigur so ein realistisk meting av støðuni? Ber okkum 50.000 borgarum í Føroyum til at skapa og reka eitt nýmótans vinnulív í altjóðagjørda heiminum uttan einans at dúva uppá annaðhvørt tilfeingi í sjónum, undir havbotninum ella í mannakyknum? Mín meting er, at tað ber til. Hesa meting byggi eg á teir førleikar, sum Føroyar fyrr hava víst í verki samanhildið við tann veruleika, eg haldi meg hóma har úti í heimi.

Onkursvegna havi eg eina hóming av, at hesuferð fer tað at hepnast at samansjóva mangar kreftur, sum so eina so geva sítt íkast til eina felags menning. Um hendan meting vísir seg at verða røtt ella skeiv veldst ikki sørt um tað íkast, tann einstaki leggur í sína dagligu atferð, heilt frá tí, ein sigur, yvir tað ein ger og til tað, ein setir kross við, tá ið okkara politisku umboð skulu veljast.

Ein av teim stóru uppgávunum, sum ein og hvør borgari í landinum hevur - men serliga tey, sum hava formliga ella veruliga ábyrgd av at savna kreftunar - er at byggja upp eitt skapandi, konstruktivt samskifti, sum leggur dent á tað, sum kann byggja upp og leggja minni dent á tað, sum ørkymlar kjakið. Uppgávan er at stuðla upp undir veruligu umstøðurnar hjá fólki at leggja kreftur í felags tøk - og rætta eina hond, tá ið ein okkara snávar.

Δ


Landssjúkrahúsið
FO 100 Tórshavn

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ Starvsfólkadeildin

## Sjúkrarøktarfrøðingar til E3/E2

3 føst størv, á brøk 0,7 og 0,8 og 0,9 sum sjúkrarøktarfrøðingar í skiftandi vaktum á E3/E2 á Landssjúkrahúsinum, eru leys at søkja til setan, frá 1. apríl 2005 ella eftir avtalu.

E3 er ein medisinsk deild við 9 seingjaplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Røktarstarvsfólkið hevur eitt tætt samstarv við nógvar ymiskar fakbólkar, t.d. fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður eisini lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við huga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjaran**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- hollar royndir og fakligan áhuga innan sjúkrarøktina

**Vit kunnu bjóða**

- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- innleiðslu

**Upplýsingar um størvini** eru at fáa við at ringja telefon 304500 til Monicu Brickmann, virkandi deildarleiðara, lokal 6012 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 29. mars 2005 kl. 12.00.

**Skivlig umsókn**, merkt "umsókn til starv", við avriti av prógvum, CV, autorisatión, viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn.

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*



## Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 1.4 Nordic Van** *sýnaður 9/2004*, reyður, árg 1999, 5 hurðar, km 52.000 — v/mvg 69.800,-

**Ford Mondeo Ghia 2.5 V6** beige, árg 2002, 5 hurðar, km. 30.000, verður seldur fyri kunda — 230.000,-

**Peugeot 206 XR 1.9 diesel** gráur, árg 1999, 5 hurðar, km 126.000 — 79.000,-

**Ford Focus 1.6 Ambiente** reyður, árg 2000, 5 hurðar, km. 73.000 — v/mvg 85.000,-

**Peugeot 406 SR 1.8** bláur, árg 1996, 4 hurðar, km 134.000 — 69.000,-

**Ford Focus 1.8 diesel** gráur, árg 2001, 5 hurðar, km. 109.000 — v/mvg 99.000,-

**Peugeot 406 Station Car 2.0 Aut. Gear** svartur, árg 2000, 5 hurðar, km 65.000 — 129.000,-

**Honda Accord 1.6** reyður, árg 2000, 4 hurðar, km. 79.000 — 128.000,-

**Opel Astra 1.6 Club** svartur, árg 2000, 5 hurðar, km 81.000 — 87.000,-

**VW Transporter Diesel** bláur, árg 1999, 4 hurðar, km. 115.000 — v/mvg 120.000,-

**Opel Astra 1.6** bláur, árg 1998, 5 hurðar, km 110.000 — 79.000,-

**Jeep Cherokee 2.5DTi 4x4 við brotnum motori** grønur, árg 1995, 5 hurðar — prísuppskot 35.000,-

**Opel Astra 2.0 Dti** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km 110.000, fyrr kr. 115.000,- — nú 99.800,-

**Fiat Doblo 1.9d Van** hvítur, árg 2003, 4 hurðar, km. 36.000 — v/mvg 115.000,-

**Opel Vectra 1.8 16V** ljósabláur, árg 1998, 4 hurðar, km. 106.000 — nú 89.000,-

**Mazda 626 1.8 LX St.Car** reyður, árg 1999, 5 hurðar, km. 27.000, *sýnaður juli 2004* — v/mvg 116.000,-

**Opel Zafira 2.0 Dti 7 sitipláss** gráur, árg 2002, 5 hurðar, km 75.000 — 189.000,-

**Mitsubishi L300 Diesel lastbilur 2.2t** beige, árg 1991, 2 hurðar, km. 90.000 — 27.000,-

**Opel Movano 2.5 Dti Van** hvítur, árg 2002, 4 hurðar, km 28.000 — v/mvg 165.000,-

**Toyota Hi Ace Bussur 10 sitipláss diesel** bláur, árg 1998, — v/mvg 130.000,-

**Opel Frontera 2.2Ti 4x4 5 sitipláss** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km 85.000, *sýnaður juli 04* — 225.000,-

**Toyota Avensis 1.8 VVT-i** bláur, árg 2001, 4 hurðar, km. 65.000 — 129.000,-

**Citroen Xantia 1.9 DT Stc** gráur, árg 1999, 5 hurðar, km 107.000 — 105.000,-

**Toyota Avensis D4D Linea Terra** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 73.000 — 129.000,-

**Citroën Jumpy 1.9DT Van** reyður, árg 2000, 4 hurðar, km 110.000 — v/mvg 110.000,-

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu verða settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@bilarge.fo,
peugeot@bilarge.fo ella opel@bilarge.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.bilarge.fo

Sosialurin 341800

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



Lesið Sosialin - so eru tit við